# Kjak



**Kristianna Winther Poulsen**
*forkvinna í Javnstøðunevndini*

## Nýggja valskipanin – vónandi fyri bæði kyn

Serkøni arbeiðsbólkurin, ið skal gera uppskot til nýggja løgtingsvallóg, er settur, og ein kvinna og fýra menn eru mett skikkað til sess í hesum bólki.

Løgtingsformaðurin segði í tíðindunum 25. juni, at hann einki kundi gera við hesa støðu, tí at limirnir í serfrøðingabólkinum eru vald sambært tilmæli frá pørtum, sum ásett í uppskotinum til samtyktar.

Í grein 8 í javnstøðulógini er ásett, at allar almennar nevndir og líknandi skulu setast saman soleiðis at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðað. Hendan áseting fevnir eisini um tær nevndir og líknandi, sum løgtingið setir.

Tí er ringt at skilja, at løgtingsformaðurin, sum hevur ábyrgd av at seta serfrøðingabólkin, einki kann gera við, at hesin arbeiðsbólkurin ikki lýkur ásetingarnar í javnstøðulógini. Vónandi er hetta ein misskiljing, sum hann tekur stig til at rætta skjótast gjørligt.



**Felagið fyri hoyrbrekað í Føroyum**
*Nicolina Dahl*

## Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum hevur havt aðalfund

Aðalfundur var hildin í Felagnum fyri hoyribrekað herfyri. Formaðurin Jákup Danielsen segði seg frá og Marjun Hansen tók ikki við afturvali. Í teirra stað vóru vald Katrin Rubeksen og Torkil Hansen. Nevndin hevur skipað seg við Torkil Hansen sum formanni, Poul Øregaard sum skrivara og næstformanni, Katrin Rubeksen sum kassameistara og Leivur Guttesen er eykalimur. Dávur Neshamar røkir bókhald og limalista. Nicolina Dahl fer at hava skrivliga samskiftið og kunning úteftir. Ætlanin er skjótt at fáa gongd aftur á heimasíðuna www.hoyribrek.fo.

Felagið hevur átikið sær at skipa fyri fundi í Norðurlendsku samstarvsnevndini NHS, sum verður í døgunum 14.- 15. august.

Vit meta, at tað framvegis er stórliga brúk fyri felagnum til at gera vart við mong øki, sum viðvíkja hoyrnini – bæði fyribyrging og tænastu til teirra, sum missa hoyrn. Í løtuni fyriliggur uppskot til løgtingslóg um, at brúkaragjald skal leggjast á hoyritól á almennu hoyriklinikkini og at tilskotið til hoyritól á privatu klinikkini skal lækka. Felagið mótmælir hesum uppskoti, sum fer at fáa álvarsligar avleiðingar fyri hoyribrekað.

Tað eigur sum meginregla ikki at vera munur á viðgerð av hoyribreki og allari aðrari viðgerð innan heilsuverkið – øll slík viðgerð eigur at vera goldin av tí almenna.

Vit gera vart við, at eitt hoyritól er í høvuðsheitum IKKI ein útreiðsla fyri landið, men ein inntøka, tí at hoyritólið kann hjálpa hoyribrekaðum at varðveita sítt tilknýti til arbeiðsmarknaðin og sparir tískil landinum almannaveitingar.





**Demokratia**
*Oluffa Joensen*
*forkvinna*

## Jøvn kynsumboðan neyðug

Demokratia tekur fult undir við atfinningunum móti samansetingini av serkøna arbeiðsbólkinum og politiska fylgibólkinum, sum eru sett at arbeiða við eini endurskoðan av vallógini. Kvinnufelagið í Havn, Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna, og onnur hava ført fram, at tað í hesum arbeiðsbólkum eins og øllum øðrum almennum nevndum eigur at verða tryggjað ein jøvn kynsumboðan. Hetta er eins sjálvsagt og týdningarmikið, sum at tað skal vera tryggjað ein jøvn politisk umboðan og faklig umboðan.

Demokratia harmast um, at formansskapur Løgtingsins við tilnevningini av arbeiðsbólkunum báðum heldur enn at ganga á odda í arbeiðinum at tryggja eina breiða samanseting, sáar iva um vilja Løgtingsins at tryggja javna kynsumboðan í Løgtinginum. Tað hevði klætt formansskapinum at rættað hesa óhepnu støðuna við at ógilda tilnevningina og tilnevna arbeiðsbólkarnar av nýggjum, har jøvn kynsumboðan verður tryggjað.

Tað kann t. d. verða verða gjørt greitt og einfalt, eins og Kvinnufelagið í Havn skjýtur upp:

»Formansskapurin heitir á tey, sum innstilla nevndarlimir, um fyri hvønn nevndarlim at koma við tveimum uppskotum – einum av hvørjum kyni. Síðan má tað vera upp til formansskapin at seta nevndina saman, so kynsbýtið lýkur nútíðar krøv til javnstøðu«.

Hetta er vanlig mannagongd í tilnevning av almennum nevndum og tryggjar, at tey, sum tilmæla, og tey, sum tilnevna, verða noydd til at minnast til, at jøvn kynsumboðan er kravd, um tey skuldu havt (hug at) gloymt tað.

